# Maraton í Føroyum

**Stigtakararnir til Tórshavn Maraton vóna, at einir 35-40 rennarar fara at boða frá luttøku. Útlendskir maratonrennarar vísa eisini kappingini áhuga.**

MARATON RENNING
*Páll Holm Johannesen*

Rennifelagið í Havn, Bragdið, skipar 19 juli fyri fyrstu maratonkapprenningini nakrantíð í høvuðsstaðnum. Kappingin verður hóskandi kallað Tórshavn Maraton. Hetta er bert aðru ferð at skipað verður fyri maraton kapping í Føroyum. Fyrru ferð var við oyggjaleikirnar í 1989, tá føroyingurin, Absalon Hansen, endaði ovastue á sigursskamlinum.

## Samstarv við íslendingar

Í samband við Tórshavn Maraton hevur Bragdið í hesum døgum vitjan av tveimum íslendingum, sum skulu hjálpa við fyrireikingunum til kappingina. Báðir íslendingarnar eru við í samskipanini av Reykjavík Maraton, og teir skulu leggja føroyingum lag á.

Føroysku samskipararnir av Tórshavn Maraton ætla, at kappingini skal fáa altjóða viðurkenning. Fyri at tað skal eydnast, skulu nøkur krøv lúkast. Eitt nú er krav, at rutan, sum skal rennast, skal vera máta av einum góðkendum rutumátara. Hesum hava føroyingar tikið til sín, og í hesum døgum er altjóða góðkendur rutumátari í Føroyum, og hyggur at umstøðunum.

Á heimasíðuni hjá frælsum ítrótti í Føroyum stendur, at seinast í 15.juni verður kunngjørt hvør endaliga rutan í Tórshavn Maraton verður.



*Fyri fyrstu ferð verður skipað fyri Tórshavn Maraton í summar. Kappingin verður leygardagin 19.juli, og er hetta bert aðru ferð, at maratonkapping er í Føroyum. Seinastu ferð var við oyggjaleikirnar í 1989.*
*Mynd: Savnsmynd*

## Stórur áhugi

Tórshavn Maraton í ár er ein roynd av sínum slag hjá Bragdinum, og ætlanin er, at hetta skal verða eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári.

Seinnu árini eru fleiri og fleiri føroyingar farnir at renna maraton. Ein av samskiparunum av Tórshavn Maraton, Robert Vilhelmsen, sum sjálvur er maratonrennari, sigur, at um 25-30 føroyingar árliga renna maraton. Robert vónar, at Tórshavn Maraton fer at økja enn meir um áhugan hjá føroyingum at renna maraton.

Stigtakararnir til kappingina vóna, at luttakartalið verður um 35-40. Fleiri útlendingar hava sýnt kappingini áhuga, og í løtuni siga maratonrennarar úr Danmark, Íslandi og fjarskotna Mallorka seg vilja at koma til Føroya til kappingina.

## Stuttleikarenning

Fyri at skapa ein serligan renni dám í býnum 19.juli, skipar Bragdið eisini fyri stuttleikarenning fyri tey, ið ikki seta seg fyri at renna maratonteinin. Ætlanin við stuttleikarenningini er at fáa fólk at røra seg hendan dagin, uttan at nøkur krøv verða til skjótleika ella tíð. Teinarnir í stuttleikarenningini vera 5 km fyri vaksin og 3 km fyri børn.

# Heðin á Lakjuni fyri Inga Højsted

**Ungi Arsenal leikarin hevur fingið fiburskaða, og verður ikki við ímóti Íslandi leygardagin**

LANDSLIÐIÐ
*Páll Holm Johannesen*

B36-leikarin Heðin á Lakjuni fekk í seint í gjárkvøldið boð um at pakka taskuna, tí landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, hevur brúk fyri skjóta klaksvíkinginum í Íslandi. Ungi Ingi Højsted hevur fingið so álvarsaman fiburskaða, at Arsenal-leikarin ikki verður tøkur hjá landsliðsvenjaranum til dystin ímóti Íslandi leygardagin.

Heðin fór av landinum við Atlantic Airways tíðliga gjáramorgunin. Vit hittu Heðin á máli, júst eftir at hann var lendur í Reykjavík. Hann var fegin um úttøkuna, og hann kennir seg væl fyri, um brúk skuldi verið fyri honum til dystin leygardagin.



*Kviki B36-leikarin Heðin á Lakjuni fekk seint mikukvøldið landsliðboð fyri skadda Inga Højsted*

# KÍ í bólki við Fulham



*KÍ-kvinnurnar avmyndaðir eftir at meistaraheitið kom í hús í fjør. Í august mánaði sleppa klaksvíkskvinnur rættiliga at royna seg, tá tær skulu til Niðurlond at spæla UEFA Cup.*
*Mynd: Savnsmynd*

**Tað er greitt, at bólkurin hjá KÍ-kvinnunum verður leiktur í Hollandi í døgunum 21-25 august**

UEFA CUP
*Páll Holm Johannesen*

Fyrrapartin mikudagin var lutakastið í UEFA-Cup kappingini hjá kvinnum. UEFA -Cup er einasta evropeiska kappingini fyri feløg hjá kvinnum. Kappingin er fyri meistaraliðini í hvørjum landið. KÍ-kvinnurnar gjørdust meistarar í fjør, og tí fall tað teimum í lut at boða frá luttøku til UEFA kappingina Lutakastið bólkaði KÍ-kvinnurnar við Fulham úr Onglandi, Ter Leede úr Hollandi og FC Codru Anenii úr Moldova. Bólkurin hjá KÍ verður leiktur í Hollandi, og kappingin verður í døgunum 21-25 august.

## Triðju ferð

Hetta er triðja árið upp í slag, at klaksvíkskvinnur vera við í kappingini. Fyri tveimum árum síðan vóru tær í Finlandi og í fjør leiktu KÍ-kvinnurnar í Svøríki. KÍ-kvinnurnar hava vunnið dystir bæði árini, so úrslitini kunnu ikki sigast annað enn at hava verið góð. Góðu avrikini farnu árini sæst eisini aftur í styrkismetingini hjá UEFA, tí til lutakastið vórðu KÍ styrkismettar í bólki trý, og hetta merkir at føroyska meistaraliðið er í millum 24 tey sterkastu meistaraliðini í Evropa.

## Kenna lítið til mótstøðuliðini

Eftir lutakastið mikudagin, fingu vit orðið á venjaran hjá KÍ seinastu árini, Jón Harald Poulsen. Hann sigur seg kenna lítið til mótstøðuliðini. Sambært Jón Haraldi, so er Fulham júst farnar at spæla hálva tíð, eftir at leikarar hava verið fulltíðar yrkisleikarar í nøkur ár. -U-19 landsliðið hjá kvinnunum hevur leikt bæði ímóti Onglandi og Moldova, og tað er tað einasta vit vita í løtuni. Komandi dagarnar verður farið at leita eftir upplýsningum um mótstøðuliðini, sigur Jón Harald at enda.



# Rundur dagur í grannauppgerðini

**Eftir øllum sólarmerkjum at døma, verður Julian Johnsson leygardagin fimti føroyski landsliðsleikarin, sum rundar teimum 50 landsdystunum**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/*
*Jákup Mørk - Reykjavík*



Higartil eru tað bert fýra leikarar, sum hava rundað teir hálvt hundrað landsdystirnar. Øssur Hansen, Óli Johannesen, Jens Martin Knudsen og Allan Mørkøre eru einasti leikararnir, sum eru í hesum fína selskapinum, men leygardagin legst væntandi ein afturat.

Gongst alt sum ætlað, so verður talan nevnliga um 50. landsdystin hjá Julian Johnsson, og sjálvur viðgongur hann eisini, at tað hevur nakað at siga persónliga, at hann nú er um at røkka hesum talinum.

– Eg skal ikki siga, at tað er eitt mál í sjálvum sær, men sjálvandi fert tú at hugsa um tað, tá dystirnir gerast nógvir í tali. Ikki soleiðis, at eg í fleiri ár havi hugsað um runda talið, men tá kemur upp dyst nummar 46 og 47 og har á leið, so fert tú av tær sjálvum at hugsa soleiðis. Tá kann man kanska siga, at talan verður um eitt lítið mál á vegnum, heldur hann.

Til stuttleikar kann nevnast, at tá Julian í síni tíð leikti fyrsta landsdystin móti Finnlandi, vóru hann og Allan Joensen úr KÍ landsliðsleikarar nummar 50 hjá Føroyum í altjóða høpi, so runda talið er kanska ikki heilt so fremmant hjá honum.

*– Tá kemur upp dyst nummar 46 og 47 og har á leið, so fert tú av tær sjálvum at hugsa um tey hálvt hundrað, heldur Julian Johnsson*

## Metið enn einki mál

Júst fyltur 28 ár kann tað eisini roknast við, at Julian verður tøkur á landsliðnum í nøkur ár framyvir, og tað er nokk ikki heilt óveruligt at tosa um, at skal næsti metmaðurin eftir Óla Johannesen finnast, so verður tað helst Julian Johnsson.

Spurdur hvør hetta eisini er nakað, sum hann hevur hugsað um, ivast Julian tó eitt sindur.

– Tað er klárt, at tað vildi verið nakað serligt, um eg ein dagin kom at standa við landsliðsmetinum, men tað er ikki tað, sum tað snýr seg um nú. Sum landsliðsleikari mást tú bara taka ein dyst í senn, og tann næsti av slagnum er so í Íslandi leygardagin, og har verður ivaleysa mikið at hugsa um.

– Talan er jú um grannauppgerð hjá báðum pørtunum, og eg ivist ikki í, at allir mans fara at gera sítt ítarsta á vøllinum. So mugu vit bara vóna, at tað verður nóg mikið, heldur miðvallarin, sum eftir øllum at døma skal halda rundan dag leygardagin.

# Vinarlag skal standa sína roynd

**Stórur partur av umsitingini og politikarum hjá Tórshavnar Býráð eru við í ferðalagnum, sum kom til Reykjavíkar mikudagin**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/*
*Jákup Mørk - Reykjavík*



*Borgarstjórin í Havn tók til, at fyri vinarliga býanna millum var tað helst gott, at umboðini hjá Tórshavnar Býráð sleppa sær avstað beinanvegin, sum føroyska liðið hevur tikið sær av Íslandi*

Tað eru ofta hópur av trúføstum áskoðarum, sum fylgja við føroyska landsliðnum, tá dystir verða leiktir uttanlands.

Stórur partur av hesum eru tíðum tey somu ferð eftir ferð, men í flogfarinum hjá Atlantic mikudagin vóru tó eisini nøkur, sum ikki eru heilt so føst í hesum sambandi.

Tórshavn og Reykjavík eru vinarbýir, og nú landsdystur landanna millum skal spælast í Reykjavík, er stórur partur av býráðnum í Reykjavík. Tað eru nú eisini onnur ørindi á skránni.

- Tað er soleiðis, at grunnurin, Nuuk-Tórshavn-Reykjavík, hevur sín árliga fund í Reykjavík í ár, og tað fall soleiðis, at hetta var jús í somu døgum, sum landsdysturin skuldi spælast, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

- Upprunaliga var tað ikki partur av ætlanini at fara til landsdyst, men nú alt liggur somikið væl fyri, gjørdu vit av at bjóða teimum íslendsku og grønlendsku umboðunum til dystin.

Og sjálvt um slíkar innbjóðingar ofta verða sendar, til tess at styrkja um vinarlagið millum partarnar, so ivaðist Jan sjálvur í, hvørt hetta fór at hjálpa nakað serligt í so máta.

- Tað veit eg nú ikki. Eg segði í øllum førum við íslendsku vertirnar, at tað helst var nokk so gott, at vit skuldu avstað alt fyri eitt, sum dysturin er liðugur. Eg rokni í øllum førum ikki við, at teir høvdu verið so øgiliga blíðir, eftir at okkara menn hava vundið burtur úr Íslandi.

